# Stress down - Double up!

KRISTINA TOFTEGAARD LARSEN



Endiliga hava myndugleikar okkara hækkað upptøkuna av námsfrøðingum og lærarum. Hetta er at gleðast um, men er langt frá nógmikið, tí tíverri er stórur skaði longu hendur á økinum. Í hvussu er innan námsfrøðiliga økið, tí her hevur altíð verið stórur mangul á fakførleika.

Tað vísir seg nevniliga, at alsamt fleiri námsfrøðinar og lærarar tíverri bukka undir tí hørðu lagnu at brenna út. Hetta eru mennisku við góðum fakligum og menniskjaligum førleikum, ið hava overvað seg í vøggustovu, barnagarði, skúla, frítíðarskúla, á bústovni, serstovni v.m. Hetta eru dugnalig og arbeiðssom menniskju, ið ár undan ári havi givið frá sær umsorgan, kærleika, ansni, undirvísing og upplæring til børn og teirra foreldur, til samstarvsfelagar og myndugleikar.

Hesar lagnur, ið overva seg, vóru einaferð fullar av tilfeingi, men mugu geva skarvin yvir. Uppgávan bleiv ov stór vegna umstøður, ið lættliga kundu verið betri, um politikkurin á økinum hevði arbeitt meira tilvitað og málrættað. Uppgávan hevur verið ov stór. Ikki ov stór til fakførleikan, men ov stór í mun til politisku raðfestingina í okkara annars framkomna samfelagi.

Mangir av hesum fakpersónum hava staðið einsamallir við ábyrgd. Ábyrgd fyri at taka ímóti 10- 20 nýggjum børnum á hvørjum árið. Ábyrgd at stríðast fyri at fáa serhjálp og stuðulstímar til børn við serligum tørvi, og tá hetta ikki eydnast- ja, so liggur enn størri ábyrgd á hesum fakpersónum, ið eru um børnini. So royna tey at spenna enn breiðari, royna at strekkja seg enn meira, við tí úrsliti, at byrðan gerst ov tung, úrslitið kámast og skaði hendir á øllum økjum, bæði menniskjaligum og fakligum.

Tað kann ikki vera rætt, at okkara politiski myndugleiki situr hendur í favn. Tað kann ikki verða rætt, at vit fram um hetta økið ynskja at raðfesta undirsjóvartunnlar, ella at skera blokkin við einum tankaleysum pennastroki, tá okkara framtíðar tilfeingi og teirra fakpersónar eru í vanda.

Halda vit áfram við at niðurraðfesta útbúgvingar og umsorganarøkið verður skaðin størri og fleiri verða teir fakpersónar, ið fara av økinum. Økið verður minni og minni attraktivt, og færri verða tey, ið ynskja at nema sær fakførleika. Tí er avgerandin neyðugt, at nógv fíggjarlig orka verður avsett til at fyribyrgja strongd hjá fakpersónum á hesum økið. Somuleiðis eigur alt økið skjótast, at raðfestast dupult so høgt.

Raðfesting í útbúgving og vitan er ein framtíðaríløga til eitt vælferðarsamfelag. Neyðugt er við enn fleiri lestrarplássum til námsfrøðingar og lærarar. Munandi hægri løn til fakpersónar á umsorgar og skúlaøkinum. Størri játtan og normering til børn við serligum tørvi. Góðir og framkomnir karmar eru ein sjálvfylgja, og eiga ikki at verða ein kampur hjá einstaklingum at taka sær av. Ein hægri játtan til stovnar og skúlar eigur at raðfestast høgt, so peningur er til førleikamenning og supervisión.

Um vit vilja bøta um longu hendar skaðar, og at varðveita eitt vælferðarsamfelag – so eiga vit at marka milliarda upphæddir til umsorganar og útbúgvingarøkið TAKK!

# Søluátak fyri knæull ella upplýsing um grundlóg

SJÚRÐUR SKAALE



**Jan A. Joensen átti at sett seg inn í tingini, áðrenn hann roynir at spæla stuttligur**

Formaðurin í landsnevnd Sjálvstýrisfloksins, Jan Asbjørnson Joensen, hevur ordiliga svingað seg upp í bløðunum í mánadagin.

Sjúrður Skaale er, heldur hann, farin "til Kongens København at gera okkum føroyingum fyri skommun við piprandi knøum eins og kærar á trappunum á Christiansborg". Og at eg havi gjørt Christiansborg til "fremsta søluátak fyri føroyskari knæull".

Og so heldur Jan seg helst hava víst, at hann ikki er heilt óeffin, tá tað snýr seg um oratorisk snildi...

Hvussu væl hann dugir at jonglera við orðum skal eg lata onnur meta um. Onkur heldur helst at hann er heilt fiksur. Men innihaldinum í greinini er lítið høpi í!

Tað, Jan hevur so ilt av, er, at eg havi spurt forsætisráðharran um hann viðurkennir, at tað ikki er danska grundlógin, men vilji Føroya fólks, sum er evsta rættarkelda í Føroyum.

Hetta er viðkomandi, tí í uppskotinum til føroyska stjórnarskipan stendur, at føroyingar hava rætt loysa seg úr sambandinum við Danmark. Fáir føroyingar ivast í, at vit hava henda rætt. Og henda rætt fáa vit, sum Jan sjálvsagt veit, ikki úr donsku grundlógini.

Eg haldi tað ikki vera nakran trupulleika, tí Føroya fólk hevur hvørki skrivað ella viðtikið donsku grundlógina, og vit hava ikki heimild at broyta hana. Tí er hon ikki okkara grundleggjandi rættarkelda. Okkara grundleggjandi rættarkelda er vilji Føroya fólks.

**Danska støðan**
Men hesum eru danskir myndugleikar ikki samdir í.

Føroyska uppskotið til stjórnarskipan verður í løtuni kannað í forsætismáláraðnum, og sum eg skilji vendir tummilin niður. Hildið verður, at føroyingar ikki hava rætt at samtykkja uppskotið.

Spurningurin um okkara rætt at seta stjórnarskipanina í verk varð eisini reistur í fólkatinginum í februar. Ikki av mær, men av Dansk Folkeparti. Og tá segði Fogh Rasmussen, at "så længe Færøerne er en del af rigsfællesskabet, har Færøerne ikke kompetence til at vedtage regler (i form af en færøsk grundlov), som skal have forrang for grundloven."

Hetta hevur verið niðurlagið, hvørja ferð málið hevur verið umrøtt: Danska grundlógin stendur ovast, og einki kann samtykkjast í Føroyum, sum ikki byggir á hesa grundlóg.

**Mín skylda**
Tá hetta verður ført fram fleiri ferðir, so havi eg hildið tað verið mína simplu plikt sum føroyskur folkatingslimur at boða frá hvussu mín flokkur - og ein stórur meiriluti av føroyingum - síggja málið.

Hetta havi eg gjørt í røðum og gjøgnum fyrispurningar. Minst til: Endamálið við einum fyrispurningi er ofta at lýsa samanhangin í einum máli. Tað er ein góður háttur, tí ráðharrin er tvingaður at taka støðu til tekstin í einum fyrispurningi.

Eg havi ikki "spurt um loyvi" til nakað sum helst, men greitt frá hvussu eg síggi málið - og hví eg haldi, at Fogh´sa fatan er skeiv. Tað hevur altso verið talan um upplýsing fyrst og fremst. Upplýsing, sum vónandi kann føra til dialog, og forða fyri samanbrestum seinni.

**Embætis-politikarar**
Annars er mín hugsan um stjórnarskipanina, at vit sjálvsagt skulu samtykkja hana. Tað má ikki henda, at vit lata okkum forskrekkja av, at forætisráðið kallar tað grundlógarbrot.

Embætismenn søgdu eisini, at heimastýrið var grundlógarbrot – inntil tað kom ígjøgnum. At yvirtaka undirgrundina søgdu teir eisini vera grundlógarbrot – inntil yvirtøkan varð framd.

Sakin er tann, at metingar hjá embætismonnum nærum altíð eru politiskar metingar. Tær verða brúktar av politikarum, tí tað er nógv lættari politiskt at siga: "Grundlógin forðar tí" enn at siga "eg sigi nei".

Hetta er eisini nakað, eg havi víst á í fólkatinginum í sambandi við tað, embætismenn hava sagt um okkara stjórnarskipan.

Ikki tí eg vil geva meg undir eina danska fatan, men fyri at gera vart við og greiða frá teirri fatan, sum eg og flest aðrir føroyingar hava um hetta.

Hvat eg havi sagt og skrivað, kann Jan lesa inni á tjodveldi.fo. So sær Jan, at eg aldrin havi "gjørt føroyingum fyri skommum" ella "spurt danir, hvar føroyingar meina", sum hann kastar mær fyri.

Tað, Jan so forhánisliga kallar "søluátak fyri knæull", er upplýsing um eitt mál, har bæði fólkatingið og stjórnin hava ført fram sjónarmið, sum fáir føroyingar góðtaka.

Hesa upplýsing havi eg sæð sum mína skyldu. Og eg eg haldi tað vera hugstoytt at hoyra, at hevði listi D sitið á fólkatingi, so hevði einki orð verið sagt um tað føroyska sjónarhorni í hesum máli.

# Antikrist komin til Havnar

N-JÓN ELLENDERSEN



Antikrist – onkur vil vera við at hann melur í Havnar gøtum
lúshundurin, sum um Havnin ikki hevði nóg mikið
enn eru snøklar á Tórsheðinsá Vølli sum ikki eru lidnir
bygdafólk slíta asfaltið og framleiða permanentar ferðslutøppar
og nú, Antikrist í smølu gøtunum úti á Tinganesi!
Løgið tó, í tíggju minuttir aftan á at vit lendu í Vágum helt eg
at veruligar broytingar høvdu rakt landið fyri fyrstu ferð
at Føroyar nú endiliga høvdu skrykt seg leysar úr haftinum
donsk mentan hevur havt á okkum í minst 12 mansaldrar
sjálvviljaða trælahaftið vit av álvara tóku til okkara í '48.
Komin suður um Leitisvatn visti eg at vónin longu var brostin
tá eg toygdi meg at vita um eitt lítið hol í mjørkanum
lat meg fáa eygað á landið úr erva – har alt var friður og frøi
var tað tí eg kendi ein sting í høgru lið – ein liberalistiskan sting
sum verandi landsstýrið etur Vismut í blikkum fyri at doyva.
OG so, knappliga, rakti tað meg sum eitt ódnarvegur!
tað sum ikki var tá vit fóru at reika Sviaríkið runt – tað flóvisliga
tað sum ger at útlendingar hava stóran stuttleika av okkum
uttan danir: teir koma ístaðin við síni forskoldaðu betrivitan
og fjala sínar egnu brølarar í geylinum um okkara býttleika.
Jú, nú var tað okkurt felag sum kallaði seg "Gudloysi" – haldi eg
sum um tað skuldi vera okkurt heilt serligt og snilt, men ístaðin
bara vísir, at vit eru ikki ment ein tumma síðani vit seinast
gjørdi okkum fyri skommum heilt suður í amazonskógin, har
giraffarnir lógu flatir og hildu sær um kýkin – og leyvan græt.
Hoyr tú, Antikrist gamli, hevur tú einki fragari at takast við
enn at mæla runt í Havn og skriva løgin lesarabrøv – tað siga tey,
ert tú helst bara ein efturgerð, ílatin ein gekkaskort frá 50'unum
onkur fann á einum gomlum hanalofti, illa farin av fukti og lukti
sproyta "Kill-It" á dølgin og tað flóvisliga er fiksað – hesuferð!

Visti tú ikki tað? Sosialurin